## NØVN Í VIKUNI

# Skúladrongur úr Vanløse í starvsvenjing hjá P/F Wenzel



**Hetta er tíðin tá fleiri av teimum, sum ganga á framhaldsdeildunum í fólkaskúlanum eru í starvsvenjing á teimum ymisku arbeiðsplássunum í landinum. Torkil H. Sørensen úr Vanløse er í starvsvenjing hjá P/F Wenzel**

STARVSVENJING
*Magnus Gunnarsson*

Tað er heldur óvanligt, at tey ungu velja at vera í starvsvenjing uttanfyri sítt egna land. Torkil H. Sørensen, sum gongur í 8 flokki í Kirkebjerg Skole í Vanløse, ynskti at koma í starvsvenjing í Føroyum. Torkil, ið er hálvur føroyingur, setti fram ynski um at sleppa at arbeiða á einari føroyskari fyritøku. Av tí at mammubeiggi hansara, Anthonius Dalsgaard, er verkførari á bilverkstaðnum hjá P/F Wenzel í Havn, kontaktaði skúlin fyritøkuna, og har var einki til hindurs fyri, at Torkil kundi koma í starvsvenjing hjá teimum.

Starvsvenjingin í skúlanum har Torkil gongur er bert í eina viku, meðan vit í Føroyum hava tvær vikur. Men av tí at vetrarfrítíðin kom beint eftir starvsvenjingina, sleppur hann at arbeiða hjá P/F Wenzel báðar vikurnar. Torkil fer heim aftur komandi leygardag. Hann er væl nøgdur við starvsvenjingina og arbeiðsplássið. Tað er annarleiðis og ein broyting at koma til Føroyar at arbeiða. Spurdur um hvat hann ætlar sær at læra til, sigur Torkil, at sum nú er kundi hann hugsað sær at lært til maskinverkfrøðing, men hann er ungur enn, so tað kemur tíðin at vísa.











## Til minnis um

# Hans Jákup



Tá ein vinur doyr, følist tað stundum sum ein partur av tínum egna undirlendi hvørvur, og tú sjálvur ert komin eitt stig nærri eggini.

Tað var í teimum døgum, tá vár- og summarkvøldini altíð vóru lýggj og still. Tað var tíðin tá fólk enn dugdu at ganga á egnum beinum. Aftaná náttturða fóru fólk at spáka sær ein túr, heim gjøgnum býin, oman á Kongabrúnna og niðan aftur. Heilsast, biðja góðan dagin, práta eina løtu, og so aftur til hús. Hans Jákup búði úti á Velbastaðvegnum og eg í Hornabø, so hóast vit ikki kendust, so gingu vit ofta sama veg. Og á onkran hátt komu vit so at práta saman. Hann gekk á preliminer og eg í real.

Tað var eisini tann tíðin tí nýggir línubátar komu flaggskrýddir til landa at kalla fjúrtanda hvønn dag. Tá hendi so nógv nýtt, tað gekk frammá móti nýggjum tíðum. Ofta komu vit spákandi út eftir Hospitalsvegnum, yvir brúnna um Rættará, framvið Poul Müllars trøð, sum angaði av grógvandi grasi. Longur úti varð steðgað á, vit hugdu at nýggja stálskipinum, sum Kjartan Mohr var farin at byggja. Hans Jákup hevði longu verið til skips, og visti at fortelja um tað strævna fiskimannalívið. Longu tá var hann sosialistur og tjóðveldismaður.

Eg haldi, at tað var eitt kvøldi vit stóðu har og prátaðu um Porkening, at hann fortaldi mær um hendingina tá íslendski trolarin Góðanes fór á Flesjarnar og sakk. Hann var sjálvur við einum øðrum íslendskum trolara, sum lá har hjá. Hans Jákup dugdu væl og livandi at siga frá øllum tí hann har hevði sæð, og ikki minst hoyrt. Eg síggi hann enn fyri mær, næstan við tárum í eygunum, tá hann fortaldi um ta dramatisku løtu, tá Góðnes brotnaði tvørturav, hetta lemjandi ljóðið av stálplátum sum skrædnaðu í sjónum, og hvussu skjótt hetta skipið so fór undir kav. Aftaná var tigandi løtu, hann vendi sær við og hugdi niðan á Kirkjubøreyn, sum hetta kvøld hevði fingið henda serliga bláreyðgylta litin av kvøldsólini, og hann segði bara: "Hygg, er hatta ikki flott?"

Vit fóru báðir niður at lesa í 1962, og báðir vóru vit so hepnir at sleppa inn á Garð at búgva. Tað varð gott uppá fleiri mátar. Har búðu framman undan nakrir føroyingar, sum kundu leggja okkum lag á. Men Hans Jákup var komin at búgva niðast, beint út móti St. Kannikestræde, fyrsta vindeyga. Tað kundi til tíðir vera nokkso troyttandi, tí nógv bankaðu uppá, og eisini var tað ofta seint. Men tað var ein góð og aktiv tíð uppá mangar mátar hjá Hans Jákupi. Hann legði orku í at fáa Framan at blíva eitt nýskapandi blað hjá føroyska vinstravonginum. Myndin vísir umstøðurnar at gera blað tá. Ein kassi upp eftir enda, ein skrivimaskina, og ein maður sum hevur nakað uppá hjarta.

Men seinni, tá maoistiskir sekteristar, ella hvat teir annars vóru, fóru at gera um seg og køvdu alt skapandi arbeiði, tá tók Hans Jákup seg burturúr. Eg minnist einaferð hann av sínum eintingum hevði gjørt ein marxistiskan orðalista, sum limirnir kundu brúka í lesiringunum, um teir hildu gagn verða í hesum. Tá fóru ávísir persónar at krevja atkvøðu um orð og setningar. Tað varð honum ovboðið.

Eg skal ikki nevna so nógv um hansara akademisku karrieru, sum onnur longu hava sagt frá, men aktivur og produktivur var hann. Seinast eg vitjaði hann, lá hann á hvíldarheiminum, eftir stóra operatión. Men hóast tað so var lagið gott, og hann segði frá skemtiligum søgum og tilburðum sum altíð. Hann tosaði eisini um alt tað, sum hann enn ikki hevði fingið av skafti, øll hugskotini og allar planirnar. Tað gekst tó ikki heilt sum ætlað tey seinastu árini. Men eg fari at minnast ein vinsælan og vitugan gjáardrong, sum bleiv mín góði vinur.

**Rolf Guttesen**



Tí vil løgmaður hava alt tilfar á sítt borð:

# Vanligu mannagongdirnar eru ikki fylgdar

**– At hava politisk motiv við eini starvssetan merkir, at tú krevur eina starvssetan við einum serstøkum politiskum útviklingi fyri eygað, og er talan um slíkt, kann tað sjálvandi ikki góðtakast sigur Anfinnur Kallsberg, løgmaður, sum ætlar sær at kanna alt málið um setan av landsantikvari**

STARVSSETAN
*Jan Müller*



*Løgmaður vil hava øll skjøl hann kann fáa í málinum um landsantikvarin*

Nú málið um landsantikvarin hevur verið til umrøðu í Magistarafelagnum, ið krevur, at landsstýrismaðurin tekur setanina aftur, og landsstýriskvinnan kortini stendur føst við sítt hava vit spurt Anfinn Kallsberg, løgmaður, hvat hann nú fer at fyritaka sær í málinum.

Løgmaður sigur, at hann heldur fast við sítt, at hann vil hava øll skjøl í málinum frá Mentamálastýrinum, tí tað sum ein partur av tí eftirlitsarbeiði, sum áliggur honum sum løgmaður og arbeiðsgevari hjá landsstýrismonnum, tá eitt slíkt mál tekur seg upp.

Uppá fyrispurning hvat løgmaður sigur til, at landsstýriskvinnan stendur fast við sína avgerð og at hon nú fer at hyggja nærri at embætisførsluni hjá sínum embætisfólkum sigur løgmaður, at tað skal í hvussu er nógv til fyri at siga teimum úr starvi.

- Tað at tú hevur embætismenn sum tænastumenn er júst fyri, at teir skulu brúka sína fakligu kompetansu uttan at skula hugsa um, at teir kunnu verða sagdir upp uppá null og nix. Tí hevur tú embætismenn so tætt upp at einum landsstýrismanni.

Løgmaður hevur annars í brævi dagfest 5. ferbruar biðið landsstýriskvinnuna um at fáa frágreiðingina um málið og fær hann hana í vikuni.

Men er løgmaður vísur í, at hann fær øll viðkomandi skjøl og allar upplýsingar til tess at kunna taka eina nøktandi avgerð í málinum?

- Tá eg fari inn í eina slíka sak, so er tað tí, at eg skal hava alt á borðið. Men eg havi ikki somu heimildir sum eitt nú ein kanningarstjóri hevur. Men eg fari at syrgja fyri at fáa tað innlit, sum eg skal hava.

Uppá fyrispurning um løgmaður torir at seta sjálva samgonguna uppá spæl kemur tað so langt í hesum málinum sigur Anfinn Kallsberg:

- Skal eg svara generelt uppá handa spurningin kann eg bara siga, at tað verður yvirhøvur ikki hildið hondina yvir nøkrum, sum kemur fram og sum kann skjalprógast er lógarbrot, uttan mun til hvør landsstýrismaðurin er. Tað vil vera ein uppsøgn. Vit hava fyrr hava sæð samgongur rokið uppá uppsøgn av einum landsstýrismanni. Tann váðin er altíð. Men tað skal undirstrikast, at tað er ikki ólógligt ikki at fylgja setanarpolitikkinum.

Løgmaður sigur annars, at tað skulu ógvuliga vektigar grundir til at ganga ímóti eini einmæltari og kvalifiseraðari innstilling, tá eitt starv skal setast.

Tað er tí, at tú skal ikki hava nakran iva um, at tað liggja politisk motiv aftanfyri eini starvssetan.

Løgmaður leggur dent á, at hevur tú ein setanarpolitikk, so má hann eisini fylgjast. Verður hann ikki tað, so er eingin grund til at hava ein slíkan politikk. Men tað vil løgmaður so kortini.

## Politisk setan!

Nú nógv av orðaskiftinum hevur snúð seg um eina politiska setan og hvat liggur í hesum spurdu vit løgmann, hvat hann meinar við, tá hann brúkar vendingina politisk motiv fyri eini setan.

- At hava politisk motiv við eini starvssetan er, at tú krevur eina starvssetan við einum serstøkum politiskum útviklingi fyri eygað.

*-Hevur tú varhugan av, at hetta liggur aftanfyri?*

- Tað kann eg einki siga um enn, tí eg veit tað ikki. Eg havi bara sagt, at tær vanligu mannagongdirnar viðvíkjandi setanarpolitikkinum eru ikki fylgdar í hesum førinum. Tá tað kemur ein einmælt innstilling, so plagar hon at verða fylgd.

*- Nú hava fleiri viðmerkjarar í bløðunum og eisini landsstýriskvinnan sjálv borið uppá mál, at setanarnevndin hevur ikki gjørt sítt arbeiði gott nokk og róð verður eisini framundir, at fólkini í setanarnevndini eru ikki neutral men taka sjálv politisk atlit?*

- Í seinasta lagi er tað eisini landsstýrismaðurin, sum hevur ábyrgdina av eini setanarnevnd. Tað man skal hava fyri eygað er, at tú fær eina slíka nevnd soleiðis samansetta, at tú burtur úr hasum fólkunum kann finna tey røttu fólkini til at seta teir røttu spurningarnar til eitt starv, sum er lýst leyst.



FØROYA LANDSSTÝRI

LSM. FINGIÐ AVRIT

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Mentamálaráðið
Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður
Hoyvíksvegur 72
Postsmoga 377
110 Tórshavn

5. februar 2003
Mál: 123-0009/2003

Víst verður til mongu atfinningarnar, ið eru komnir í kjalavørrinum av, at landsstýrismaðurin í mentamálum ikki fylgdi tilmælum frá einmæltum setanarbólki, tá hann tók avgerð at seta starvið sum landsantikvarur.

Samsvarandi § 33 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya heitir løgmaður á landsstýrismannin um at fáa eina nágreiniliga lýsing av málinum um at seta landsantikvar. Harafturat verður biðið um avrit av viðkomandi skjølum í málinum umframt skrásett skjalayvirlit í teimum málum, ið á nakran hátt hava við nevndu setan at gera.

Løgmaður tekur sum givið, at hetta verður gjørt við atliti at fyrisitingarlógini og lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.

Vinalig heilsan

Anfinn Kallsberg
løgmaður

Marjun Hanusardóttir
løgmansstjóri

*Brævið frá løgmanni til mentamálaráðharran*


